## Flaggdagshald í Hvalvík

Skótaliðið Borgin í Hvalvík skipar fyri Flaggdagshaldi við skúlan í Hvalvík fríggjadagin klokkan 16. Magni Laksafoss, løgtingsmaður, flytur fram røðu, og Eiðis Ljómfelag spælir. Aftaná verður tombola í skúlanum til frama fyri skótarnar, og høvi verður eisini at fáa sær ein kaffimunn við onkrum góðum afturvið. Skótar og ítróttarfólk møta í Gamla skúla kl. 15:45, sigur Skótaliðið Borgin.

## ... í Kollafirði

Flaggdagshald verður í skúlagarðinum í Kollafirði flaggdagin klokkan 13.30. Skótar og ítróttarfólk ganga skrúðgongu frá Bygdarhúsinum. Durita Tausen heldur røðu. Sólvá Ford syngur, og Bjørn Djurhuus stendur fyri felagssanginum. Aftaná verður kakao og franskbreyð til øll og andlitsmáling til børnini. Skótar og ítróttarfólk skulu møta við Bygdarhúsið klokkan 13.15, sigur Skótaliðið TÚGVAN í Kollafirði.

## ... og á Oyrarbakka

Á Oyrarbakka er tað Skótaliðið Knúkur, sum skipar fyri flaggdagshaldi flaggdagin klokkan 15. Tað verður Frits Johannesen, lærari og listamaður úr Fuglafirði, sum heldur flaggrøðuna og Eiðis Ljómfelag spælir.

# Norðoyingar fáa betri samband sum skjótast

**Helena Dam á Neystabø fer at brúka hetta árið at leita eftir nýggjum skipi til ferðasambandið til Svínoyar og Fugloyar og tað skal ganga skjótt at útvega nýtt skip**

FERÐASAMBAND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað skal ikki ganga long tíð til norðoyingar fáa nýtt ferðamannaskip til siglingina út í Svínoyar og Fugloyar ístaðin fyri Másan.

Tað sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógarmálum.

Í løgtinginum í gjár vildi Jákup Mikkelsen hava at vita, hvat røkist fyri at útvega nýtt ferðamannaskip til Svínoyar og Fugloyar.

Helena Dam á Neystabø sigur, at á fíggjarlógini í ár, sum nú er til viðgerðar í Løgtinginum, hevur hon fingið 3,5 milliónir krónur afturat til Strandferðsluna.

Og tann peningurin skal brúkast til at útvega svínoyingum og fugloyingum nýtt ferðamannaskip.

Peningurin skal brúkast til at kanna, hvør loysnin er tann besta fyri svínoyingar og fugloyingar og beinanvegin, fíggjarlógin er samtykt, verður farið undir at kanna, hvør loysn er tann besta.

Talan kann vera um at keypa eitt skip, at byggja eitt skip, ella at brúka eitt av skipunum, sum Strandferðslan longu eigur.

Annars kannar Strandferðslan javnan um skip eru á marknaðinum, sum eru hóskandi til hesa farleiðina.

Kortini legði Bjørt Samuelsen dent á, at ongin avgerð verður tikin, fyrrenn fólkið á staðnum er eftirspurt.

Hon vildi kortini ikki lova, nær Másin fær ein avloysara, um tað verður næsta ár, ella um tvey ella trý ár.

Í øllum førum ætlar hon, at tað skal vera í hesum valskeiðnum.

Hinvegin verður eisini tosað um at gera undirsjóvartunnul til Svínoyar, men verður tað tann endaliga loysnin, verður hetta sjálvandi samskipað við ætlanina um at finna hóskandi ferðamannaskip.

Jørgen Niclasen heitti á landsstýriskvinnuna um at kanna eftir um tað ikki ber til at einskilja siglingina út í Svínoyar og Fugloyar. Hann vísti til Mykinesleiðina sum eitt gott fyridømi, har eitt nýggjur, privatur bátur nú røkir siglingina við avkasti, har tað fyrr var talan um eitt stórt undirskot hjá tí almenna.

Annars hevur eisini verið kjakast nógv um, hvar í Svínoy, ein ferjulega skal vera.

Tosað hevur verið um at gera ferjulegu á Eiðinum, men svínoyingar siga, at tað er høpisleyst, tí har er so ókyrt, at tað fæst ongantíð nøkur líkinda havn.

Teir halda, at einasta loysnin er at gera tunnil yvir í Havn og at gera ferjulegu har.

Hinvegin sigur Landsverk, har eru botnviðurskiftini óreglulig og har er somuleiðis harður streymur.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum upplýsti, at ætlanin er at kanna streymviðurskiftini fyri at vita um tað er ein loysn, sum ber til.

Tað er ein loysn, sum kostar 130-150 milliónir krónur.

Landsverk hevur annars skotið upp at gera eina bíligari loysn við eini ferjulegu á Eiðinum tí hann sigur, at botnkanningar og kanningar av streymi vísa, at tað er tann besta loysnin.

Hendan ætlanin kostar 30 milliónir krónur, eitt nú tí at tá slepst undan at gera tunnil.



*Másin er avgamal og hevur leingi bíðað eftir avloysa. Men tað gongst illa hjá svínoyingum at semjast um, hvør loysn er tann besta fyri svínoyingar og fugloyingar*

# Undirsjóvartunnil til Svínoyar jarðaður

**- Tað verður ongin undirsjóvartunnil til Svínoyar enn á sinni**

SAMFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verður ikki tey fyrstu árini, at farið verður undir at gera undirsjóvartunnil til Svínoyar.

Tað hevur Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, staðfest í løgtinginum.

Í gjár kjakaðust tinglimir um ferðasambandið út í Svínoyar og tað er eitt mál, sum leingi hevur verið á dagsskrá.

Tosað hevur verið um, at tað er átrokandi at bøta um ferðasambandið út í Svínoyar og í hesum sambandi hevur tosað um at gera eina nýggja ferjulegu á Eiðinum. Men tað vilja svínoyingar ikki vita av, tí teir siga, at tað ber ikki til at fáa góða havn á Eiðinum. Hinvegin vilja teir hava tunnil yvir í Havn og nýggja samferðsluhavn har yviri.

Men so hevur tað eisini verið nevnt at taka stigið fult út og gera undirsjóvartunnil út í Svínoyar.

Men Bjørt Samuelsen staðfestir, at hon hevur ongar ætlanir um fara undir at gera undirsjóvartunnil út í Svínoyar.

Leyðsliga mett kostar ein undirsjóvartunnil 350 milliónir og eina slíka verkætlan hevur hon ongar ætlanir um at fara undir.

- Tað fari eg ikki at lova, tí tað er ikki eitt lyfti, sum tað er sannlíkt, at samgongan hevði klárað at hildið, segði hon.

Jacob Vestergaard helt, at alt annað enn ein undirsjóvartunnil til Svínoyar, eru burturspiltir pengar, tí í øðrum útoyggjum eru nýggjar ferjulegur gjørdar, uttan at tað hevur hjálpt.

Hinvegin helt Jákup Mikkelsen at í minsta lagi eigur ein kanning at verða sett í verk fyri at vita um tað ikki í longdini loysir seg best at fara eftir tí bestu loysnini, sum er ein undirsjóvartunnil.

Anfinn Kallsberg helt, at einasta loysn, sum framtíð í, er at gera ein undirsjóvartunnil úr Viðoy til Svínoyar, tí tað hevði givið atgongd til eitt tað besta slættlendið í Norðoyggjum yvirhøvur og tað hevði verið eitt veruligt frambrot.

Óluva Klettskarð spurdi hví so undirsjóvartunnilin ikki var komin við øllum teimum samgongum, Fólkaflokkurin hevur verið við í.

# Nólsoyingar mugu bíða

Í ár verða ongir pengar brúktir til nýggja Ritu at sigla ímillum Nólsoy og Havnina.

Tað staðfesti Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í lógarmálum í løgtinginum í gjár.

Í løgtinginum kjakaðust tey um ferðasambandið til tær smærru oyggjarnar norðanfyri og í hesum sambandi var Kaj Leo Johannesen vónbrotin av, at samgongan hevur ikki sett eitt klovið oyra av til nýtt skip til nólsoyarsiglingina á fíggjarlógini fyri í ár, hóast tíðin langt síðani er farin frá Rituni.

Helena Dam á Neystabø sigur, í ár fekk hon bara 3,5 milliónir á fíggjarlógini til íløgur og tær ætlar hon at brúka upp á nýtt skip til Fugloyar og Svínoyar ístaðin fyri Másan.

Hinvegin staðfesti hon, at næsta ár er ætlanin at seta pening av á fíggjarlógini til nýggja Ritu.

Í hesum sambandi sæst í uppskotinum til fíggjarlóg fyri í ár, at fyribils ætlar samgongan næsta ár at seta 20 milliónir krónur av til nýggja Ritu.

Men Helena Dam á Neystabø nevndi eisini møguleikan fyri at tvinna ætlanina um betri ferðasamband til Nólsoyar og Svínoyar og Fugloyar, saman.

Ì hesum sambandi nevndi hon, at verður nýtt skip útvegað til nólsoyarsiglingina, kann ein møguleiki vera at flyta Rituna til Norðoyar at sigla til Svínoyar og Fugloyar.

**-áki-**